# Etikkur og samskifti við einstaka sjúklingin

FYRILESTUR

*Jógvan Fríðriksson*

Jalig tala
Tað er Rena Baats Dahlerup, sum í einum lítlum andaktsstykki vísir á, at tað er góð siðvenja og skilagott samskifti, um vit byrja samrøðuna ella opna orðaskiftið við jaligum sinnalagi.

Tað er lívsjáttandi at nevna tað, íð er gott ella heppnast. Tað stimbrar samskiftið og er kveikjandi fyri hugans virki, tá vit geva eina jaliga afturmelding

Um vit við tað sama meta alt høpisleysa vánaligt, so er torført at fremja ábøtur. So hava vit tørv á meira enn nýhugsan, - so mega vit skapa framtíðina frameftir. Av royndum vita vit, at vísindin og øll yrkismenning byggir á herðar teirra, íð undan gingu.

Kendi amerikanski rithøvundurin Mark Twain segði einaferð, at hann kundi liva tveir mánaðar uppá eitt rósandi orð. Hevur hann rætt, so skulu ikki so nógvar heppnar útsagnir til at nøkta árligu vælveruna.

Eyðsýnt er at samskiftið hevur tað betri, um vit í orðavalinum eru trúgv mótvegis veruleikanum. At siga eitthvørt út í tóman heim vektar sjáldan væl. Tað letur seg gera at siga tað neiliga á ein jaligan hátt. Um vit eru heppin og nýta rætt háttalag, kunnu vit siga tað neiliga á ein jaligan hátt, - í øllum førum um talan er um fak og yrki.

Nú »Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar« við ráðstevnu heldur 15 ára føðingardag, vil eg nýta høvi bæði sum brúkari og dagligur eygleiðari at ynskja tykkum tillukku við degnum. Vil loyva mær at siga, at tit saman við øðrum starvsbólkum innan heilsu- og almannaverki gera eitt gott arbeiði. Tað góða og væleydnaða, sum tit gera, nevna vit sjáldan, - taka tað sum eina sjálvfylgju. Tá eitthvørt fellur øðrvísi út enn ætlað, hava vit lyndi at nevna tað, íð miseydnast.

Munur er á at ásanna veruleikan og at dyrka veikleikar. Havi tað fatan, at heilsuverkið ger eitt sera gott arbeiði, sjálvt um allir sjúklingar ikki fáa heilsubót. Góð røkt og heilsa er meira enn at vera frískur. Góð røkt og heilsa er at kenna seg væl í sjúkuni, - so væl, sum tað nú einaferð ber til. Og tað ber til rímiliga langt ávegis!

### Etikkur

Orðið etikkur sprettur úr griskum máli og merkir: »læran um tær meginreglur, íð skipa metingina av góðum og óndum og teirra ávirkan á rætta og skynsama atferð mótvegis øðrum menniskjum«.

Etikkur er sum vísindaligt øki breitt og hevur eina fjøld av undirheitum. Aftan fyri eina etiska áskoðan liggur eitt hugsjónarligt ástøði. Etikkur er sostatt eitt fleirtáttað heiti, íð t.d. kann hava bæði átrúnaðarligt, politiskt ella annað hugsjónaðarligt innihald. Tað etiska ástøðið endurspeglast í ítøkiligari talu og verki.

Vert er at skilja ímillum hugtøkini etikk og moral. Etikkurin dvølir við tað hugsjónarliga, tær meginreglur, íð skipa lívið og samskiftið. Etikkur er hugans virkisøki, at hugsa, kveikja og menna tilvitskuna, so samveran manna millum kann virka frægast møguligt.

Orðið moralur hevur ein meira ítøkiligan dám, sum í útgangsstøði er ein fylgja av etiskum arbeiði. Tíverri er tað lættari at vera moralskur enn etiskur, tí moralin kunnu vit arva frá øðrum. Vit kunnu sjálvsagt arva etikkina, men so hava vit í roynd og veru ongantíð verið etisk, tí etikkur er hugsjónarligt ástøði. Arbeiða vit ikki tilvitað við etiskari ástøði (teori), so enda vit sum moralistar, sum fella avgjørdar niðurstøður um tað evnið, íð nú einaferð er til viðgerðar.

### Samskiftið

Í øllum nútíðar yrki og allari framtíðar leiðslu er samskiftið eitt lyklaorð. Tíðin er farin frá tí hugsan og tí leiðslumynstri, at ein persónur kann rúma allan kunnleika og mynduleika.

Tilveran sum heild er vorðin so fjøltáttað, at hvørt øki hevur sín serkunnleika. Til tess at náa eitt nøktandi úrslit er neyðugt, at øll hesi ymisku virkisøkini verða sjóðað saman.

Hendan gongdin setur nýggj krøv til teir ymisku starvsbólkarnar. Samskiftið millum teir ymsiku yrkisbólkarnar á einum arbeiðsplássi er neyðugt. Og tað er neyðugt við samskifti ímillum almenna fyrisiting og hin einstaka borgaran.

Sjálvandi skal hvør yrkisbólkur hava hollan fakligan kunnleika, men harafturat krevst, at hvør yrkisbólkur hevur ein sosial etiskan intelligens, íð skal skipa og samskipa fjøltáttaða yrkismentan.

Í dag er tað ikki nóg mikið, at vit sum starvsfólk hava hollan fakligan førleika. Nútíðin setur størri krøv. Sanne Udsen, íð er cand. polit við ph.d. grad, sigur í bókini »takt og tone i arbejdslivet«, at vit mega hava ein emotionellan intelligens. Tað merkir einfalt, at vit mega hava sans fyri tí ikki beinleiðis fakliga, íð nemur okkara yrki og tó hevur stóra ávirkan á tað fakliga úrslitið. At vit varnast tað sosial etiska klimaið bæði á arbeiðsplássi og út til brúkaran.

### Sjúkrarøktarfrøðin og samskiftið

At tann sosial etiska hugsanin hevur vunnið nakað framá sæst aftur í dagliga yrkinum hjá sjúkrarøktarfrøðini. Starvsfólkið er í størri mun tilvitað um hendan týdningarmikla leiklutin í røkt og mannsømiligum verki.

Orsøkin til tann varna málburðin er ikki ein undirmeting av arbeiði starvsfólkanna. Heldur ein staðfesting av, at tann sosial etiska hugsanin krevur nógva tíð, sum so aftur slær út í lønartímum og starvsfólki.

Ivasamt er um tað er rætt at meta fortíðina út frá nútíðini. Ivaleyst má hvør tíð metast út frá sínum egnu fortreytum. Skal eg út frá einum samskiftis sjónarhorni meta um framburðin innan sjúkrarøktarfrøðina, so er rættiliga stórur bati. At meta um fakliga innihaldið havi eg ikki førleika.

Sum tíggju ára gamal smádrongur gjørdist eg sjúkur og kom eftir drúgva sjúkralegu heima við hús suður á Landssjúkrahúsið. Síðani varð eg sendur niður og varð á Ríkissjúkrahúsinum í knappar tríggjar mánaðar.

Takksamur eri eg fyri fakliga røkt og heilsuligan førleika, - men samskiftið við starvsfólkið á Ríkissjúkrahúsinum var at kalla einki. Eg var einsamallur niðri, og tað var einki starvsfólk, íð t.d. gav longsli mínum gætur.

Soleiðis var tíðin tá. Um náttina vórðu vit børn búrað inni í rimasong, har rimar enntá vóru í erva. So sótu vit rein og mett, væl røkt og ansað sum høsn í búri til aftur lýsti for degi. Neyð var eingin, men samskiftið út frá emotionellum og sosial etiskum intelligensi var á lágum støði.

Nú eru gingin útvið fjøruti ár, og sjúkrahúsverkið er ein fullkomin dreymamynd sammett við sekstiárini. Læknavísindin og sjúkrafrøðin hava gjørt stór faklig framstig, og vit, sum fáa heilsuligan ágóða av hesi vísind og frøði, verða nú bæði sædd og hoyrd.

Nakrar ferðir eri eg sum pápi komin á Klaksvíkar Sjúkrahús og Landssjúkrahúsið. Tað er sum eitt ævintýr sammett við míni barnaár. Um tað er fullkomið, dugi eg ikki at meta, men tað er heimligari og fjálgari, og júst tað er ein partur av menniskjansligari røkt. (Havi ongantíð búleikast í Suðuroy, og tað er einfalda orsøkin til, at Suðuroyar Sjúkrahús ikki verður nevnt.)

### Samskiftið við einstaka sjúklingin

Samskiftið er eitt fjáltáttað hugtak, og samskiftast kann á ymiskan hátt. Tað talaða málið rennur oftast fyrst í huga. Orðini skapa nakað og flyta mørk. Orð skapa ein heim av vælveru ella kanska økja um tómrúmið í angist og ótta.

Saman við tí talaða orðinum er kropsmálið ein týðandi táttur í øllum samskifti. Kroppurin sendir signalir út í umhvørvið, og tey, íð síggja og hoyra, fanga signalið og gera sær sína meting. Hvør rørsla hevur eitt signalvirði, íð sjáldan er neutralt. Oftast hevur kropsmálið eitt jaligt ella neiligt signalvirði.

Sostatt er samskiftið við einstaka sjúklingin mikið meira enn ein formell vitjan á stovugongd ella ein avsett løta í kanningarrúmi. Soleiðis sum vit signalera í fakligum yrki, meta við verkið. Tess vegna er tað umráðandi, at sjúklingurin í tí hátti, sum sjúkrarøktin verður framd uppá, lesur nakað, íð kann økja um sjálvsvirðið.

Ein partur av allari røkt liggur júst í hesum, at sjúklingurin ásannar sítt egna virði. Umráðandi er at samskiftið er kveikjandi, so hin sjúki hevur eina jaliga fatan av sær sjálvum. Ein slík virðisøking í sjálvsfatan verður stimbrað, um hin sjúki varnast, at sjúkrarøktin sendur signalir, íð staðfesta virðið og taka broddin av tí fatan, at alt er líkamikið. Viðhvørt er hetta fremsta uppgávan hjá sjúkrarøktini saman við vanligari røkt, - tí viðhvørt er heilsustøðan so, at tað einasta, íð er at gera, er at vísa virðing.

### Samskiftis ábyrgd

Í øllum samskifti er tað umráðandi at vita, hvør hevur ábyrgd av samskiftinum. Væntandi kunnleiki um ábyrgd er ikki bara ábyrgdarloysi men beinleiðis skaðiligur í samlaðu viðgerðini av einum sjúklingi. Tvørrandi samskifti kann gera hin fríska sjúklingin sjúkan so at skilja, at heilsubótin stendur sum ein ósvaraður spurningur. Og tað, íð er ókent og ósvarað, elur fram ótta og skapar ótálmað hugflog.

Hugsa vit um støðuna á einum sjúkrahúsi, so eru tað læknarnir saman við sjúkrarøktarfrøðini, íð hava ábyrgdina av samskiftinum, tá talan er um heilsu, sjúkrarøkt og møguligar viðgerðarhættir.

Tað er eftir mínum tykki eyðsýnt, at rúmið, verkstaðurin hjá læknum og sjúkrarøktarfrøðini, vísir á ábyrgdarbýtið millum starvsfólk og sjúklingin. Starvsfólkið er á sínum arbeiðsplássi, og sjúklingurin vitjar í rúminum í heilsubótarørindum.

At fast við hesa ábyrgd er neyðugt, um samskiftið ikki skal enda sum tóm tala. Líkaso kveikjandi vælvirkandi samskiftið er, líkaso skaðiligt kann tað gerast, um tann fakligi førleikin verður undirmettur. Og tá tað eru læknarnir og sjúkrarøktarfrøðin, íð hevur tann fakliga førleikan, er tað eyðsýnt, at júst hesi hava høvuðsábyrgdina í tí fakliga samskiftinum við sjúklingin. Tann fakligi myndugleikin setir dagsskránna, tá tað fakliga skal umrøðast.

### Ábyrgdin hjá sjúklinginum

Alt samskifti ber í sær í minsta lagi tveir partar. Bæði avsendarin og móttakarin hava sína ábyrg, og henda ábyrgdin er í tíð samanfallandi. Tann tosandi hevur ábyrgd av tí, íð sagt verður. Tann lurtandi hevur ábyrgd av, hvussu tað sagda verður hoyrt.

Tá sjúklingurin er komin í heilsubótarørindum vegna kend ella ókend brek, so tykist tað skilagott, um sjúklingurin tekur stig til ella søkir sær fakligan kunnleika um heilsustøðuna.

Sjálvt um sjúklingurin ikki hevur ábyrgd av tí fakligu samtaluni, kann hann taka stig til eina fakliga samtalu og hvussu umfatandi ein slík samtala skal verða við atliti at sjúkuni.

Sjálvt um læknin og sjúkrarøktarfrøðin gera sama arbeiði á tveir ymiskar persónar sama dag, og tað hepnast væl í báðum førum, so kunnu hesir báðir sjúklingarnir hava ymiskar metingar av arbeiðinum. Heilsubót er ikki einans at vera ella blíva frískur, - heilsubót er eisini at kenna seg frískan.

Sjúklingurin hevur, um viðkomandi er misnøgdur ella kennir seg ov illa kunnaðan, ábyrgd av at søkja sær kunnleika. Við øðrum orðum hevur sjúklingurin ábyrgd av, at ein faklig samtala kemur í lag. Men fakliga innihaldið í samrøðuni hevur læknin og sjúkrarøktarfrøðin.

### Álit

Samskiftið byggir á nakrar grundleggjandi faktorar, sum treytað úrslitið. Hesir faktorar eru t.d. álit, tolsemi og andsfrælsi.

Hugsa vit um samskiftið millum ein sjúkrarøktarfrøðing og sjúklingin á einum sjúkrahúsi, so er karmurin við til at mynda samtaluna. Sjúkrarøktarfrøðin er í sínum dagliga yrki og hevur eina vitan, íð er nomin við lestri og roynd í dagligum verki. Karmurin um samtaluna kann skapa eina yvirvág, íð bæði kann gagna og darva samskiftinum.

Á einum sjúkrahúsi er sjúklingurin ikki í sínum vanliga umhvørvi, og hetta er í sjálvum sær ein avmarking. Harafturat kemur so tann spenningur ella ótti, íð fylgir við eini slíkari vitjan. Ymiskar orsøkir eru til innlegging, og viðhvørt ávirkar sjúkan ella brekið sinnistøðuna hjá sjúklinginum í so stóran mun, at talan beinleiðis er um sinnisbroyting. Sagt verður í vanligari talu, at vit ikki kenna hann/ hana aftur. Soleiðis plagar hann/hon ikki at vera.

Í etiskum samskifti er skilagott at velja sær ta røttu løtuna. At samtala eina ólagaliga løtu ber sjáldan nakað gott úrslit. Løtan má anda í eini ávísari javnvág millum sjúkling og sjúkrarøktarfrøðina.

Ivaleyst er torført at áseta ta røttu løtuna til samskiftið, tí so nógvir ymiskir faktorar skulu renna saman og skapa hesa løtuna. Talan er um eina meting, íð tekur útgangsstøði í tí veruleika, um eitt rímiligt mál av áliti er ímillum teir samskiftandi partarnar, um eitt hóskandi mál av tolsemi er, og um andsfrælsið vektar við sømiligari javnvág.

Sjálvt um sjúkrarøktarfrøðin kennir tað fakliga úrslitið, sum samskiftið skal náa fram til, so er týdningarmikið at laga samtaluna eftir sjúklinginum. Sjúklingarnir eru ymiskir av lyndi, og júst teirra lyndiseyðkenni má havast í huga, um vit í samskiftinum ynskja at røkka einum skilagóðum úrsliti. Tess vegna kann vegurin til úrslitið verða lættari og torførari at ganga, taka styttri ella longri tíð.

### Nærvera

Samsskiftisthátturin er alt avgerðandi fyri úrslitið av samtaluni. Um vit velja ein óhóskandi samskiftisform, kann tað henda, at úrslitið ikki er nøktandi, sjálvt um alt reint formliga er í lagi.

Sjálvt um samrøðan hevur eitt ítøkiligt innihald, og talan er um øking av kunnleika, kann hon hava neiliga ávirkan, um teir sam-skiftandi partarnir ikki møtast í sama rúmi og á sama gólvi. Talan má vera um samskifti á somu bylgjulongd.

Kirkegaard vísir á, at um vit ynskja at veita hjálp, so mega vit møta tí neyðstadda, har hann er staddur. Verður hugsað etiskt, so meta tey flestu ivaleyst, at soleiðis er tað. Hinvegin er tað væl torførari at liva upp til hesa meginreglu, tí hon krevur, at vit mega hanga hin fakliga búnan frá okkum eina løtu, og sum medmenniskju vera nærverandi á sama gólvi.

Stendur ein sjúkrarøktarfrøðingur við eina sjúkrasong, so er eyðsýnt at teir samskiftandi partarnir reint fakliga eru ójavnt stillaðir við atliti at heilsustøðuni. Sjúkrarøktarfrøðin skal altíð halda fast við sína frøði, sín fakliga førleika. Tó er tað umráðandi, at orðaval, kropsmál og andlitsbrá vísa og staðfesta eina nærveru.

Orðið nærvera er lykilin til dygdargott samskifti. Júst nærveran - tað at eyguni møtast - er eitt mál, íð hin sjúki skilir. Við hesum máli kann sjúklingurin betur skilja ella tulka tann fakliga partin av samtaluni og harvið læra seg sjálvan og sína sjúku at kenna.

Sæð út frá einum etiskum sjónarhorni er tað ein óheppin samskiftisháttur, um frøðin sum frøði skapar eina frástøðu t.d. í serligum yrkisbúna, tjúkkum bókum, tólum og sjálvhátíðarligum kropsmáli. Munabetri er samskiftið, um frøðin í yrkisbúna verður borin av einum persóni, íð megnar at umseta sítt fak til rímiliga vanligt talumál og harvið staðfesta sín fakliga og menniskjansliga samleika.

Etiskt er tað skilagott at minka um frástøðuna ímillum sjúklingin og teir yrkisbólkar, íð skulu viðgera og røkja hin sjúka. Sjálvandi skulu báðir partar samvinna í hesi søk, men eyðsýnt er, at yrkisbólkarnir hava ábyrgd av, at samskiftið reint fakliga hepnast.

### At verða sæddur

Samskiftið við hin einstaka sjúklingin hevur sjúklingin í fokus. So umráðandi er, at hin sjúki verður sæddur og hoyrdur. Serliga týdningarmikið er tað, at løtan frá tí at komið verður á sjúkrahúsið og til eina fyribils kunning ikki verður alt ov



*Jógvan Fríðriksson, prestur helt áhugaverdan fyrilestur á ráðstevnuni um sjúkrarøkt í Norðurlandahúsinum leygardagin.*

*framhald á næstu síðu*